# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 15.05.2017 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Trúgvi Gudmundarson
Niels Jacob Thomsen
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen

Ikki møtt:

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Umsókn um stuðul til námsskeið frá GSD-felagnum.**
   Einmælt samtykt at stuðla við kr. 3.000,-.

2. **Umsókn um stuðul til námsferð frá M5 á Vinnuháskúlanum.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 1.000.

3. **Val av limi í Vatnssýnisnevndina í Hvalba fyri Signar Olsen.**
   Samtykt varð at velja Jens Hammer sum fastan lim og Tommy Olsen sum varalim.

4. **Reglugerð fyri Hvalbiar havn.**
   Vega- og havnanevndin mælti á seinasta fundi til at góðtaka reglugerðina fyri Hvalbiar havn. Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum frá nevndini og taka undir við reglugerðini.

5. **Skriv frá borgara um ymisk viðurskifti.**
   1. Gøtuljós og vegur: Kommunan er í ferð við at seta nýggj gøtuljós upp og at umvæla, har tað er neyðugt.
   2. Sandurin: Bøtt verður um hesi viðurskifti.
   3. Parkering í Garðsenni: Hvalbiar Kommuna fer at umrøða hetta við Ferðslunevndina.

6. **Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd:**

- Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 431c, Sandvík.
- Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 123b, Hvalba.
- Skriv frá borgara viðv. grundvatni.
- Skriv í sambandi við málsviðgerð av byggiloyvum.
- Umsókn um byggiloyvi til stakitt/garð á matr. nr. 243a, Hvalba.

**Trivnaðarnevnd:**

- Skriv frá Hvalbiar skúla.
- Innkomin tilboð.

**Fíggjarnevnd:**

- Innkomin tilboð.
- Skriv viðv. spæliplássinum í Hvalba.

7. **Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

8. **Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 21.30

Janus Thomsen Trúgvi Gudmundarson Magni Bertholdsen Niels J. Thomsen

Niels Olaf Eyvindsson Gunnhild Mortensen Eir J. Norðberg